# Ein syrgin barnasøga









## - Rørandi barnabókaklassikarin hjá E.B. White ”Charlotte´s Web” sum ein góður filmur

UMMÆLI

*Kim Simonsen*

Ein tosandi grísur, ið gerst vinur við ein eiturkopp ljóðar kanska sum ein keðilig søga, men so er ikki í filminum ”Charlottes tryllespind” (Charlotte´s Web), ið er ein ótrúliga lærurík og rørandi barnasøga um lívsins stóru spurningar, um deyðan og ikki minst meiningin við lívinum.
Eingin søga hevur sum hendan fingið børn kring heimin at felt tár yvir vinarlagið millum ein lítlan grís og ein eiturkopp, ið at enda doyr.
Søgan byrjar eina nátt um várið, tá ein súgv fær grísar. Ein av hesum grísum er so lítil, at hann ikki kemur at yvirliva. Bóndin vil avlíva grísin, men endin er at gentan Fía fær hann at ansa eftir.
Hann fær navnið Wilbur og gerðst besti vinurin hjá Fíu. Hon er so góð við hann at hon tekur hann við í skúla, men tað gongur ikki, so Wilbur má vera hjá hinum djórunum. Har eru gæs, seyður, ein hestur og ikki minst freka rottan, men har er eitt serligt djór, ið er klóki eiturkoppurin Charlotta.

### Lívsklóki eiturkoppurin

Charlotta er kanska hitt minsta djórið, men hon er hin klókasta og besta av teimum øllum. Charlotte veit, at Wilbur nokk verður etin, tá hann er nóg feitur, og at grísar enda sum jólamatur. Hetta vil hon ikki siga Wilburi, tí hann er ein so glaður og vinaligur grísur.
Charlotta vil hjálpa honum, hon ger eina lokkanót, ið stavar ”some pig” omanyvir hurðina á stallinum. Fía er glað, tí við eitt fara fólk at ferðast til garðin. So skjótt hendan lokkanótin blæsir burtur, so er hesin spinnilvevur burtur og áhugin fyri grísinum fánar. Charlotta fer undir at fáa hini, serliga ófantaligu rottuna Gravesen, til at finna fleiri orð. Skjótt koma orð sum ”terrific” – óført, at standa á eiturkoppanetinum, men fólk gloyma skjót eina eiturkoppanót og Charlotta biður Wilbur um at læra seg kynstir, so hann kann vinna onkra virðisløn. Skjótt stendur orðið ”radiant” (glæsiligt) í spinninum omanfyri portrið.
Charlotta veit eisini, at hon má læra Wilbur um livið, at heldur ikki hon kemur at liva æviga.

### Søgan um eiturkoppin Charlottu

Hetta er ein klassisk barnabók. Hin kendasta og mest elskaða hjá høvundanum E. B. White (1899–1985), ið skrivaði bókina Charlotte’s Web, men eisini Stuart Litle.
E. B. White skrivaði eisini bøkur, sum The Trumpet of the Swan og The Elements of Style. Fyri sínar bøkur vann hann stóran heiður, the Gold Medal for Essays and Criticism of the American Academy of Arts and Letters, the Laura Ingalls Wilder Award, the National Medal for Literature, the Presidential Medal of Freedom. Í 1973 varð hann valdur inn í the American Academy of Arts and Letters.
Bókin Charlotte´s Web er ein hin mest elskaða barnabókin, ið er skriva í 20 øld. Hon er ein ótrúlig lítil perla, ið roynir at svara øllum teim stóru tilveruspurningunum, ið floyma fram í lívinum hjá øllum børnum, longu tá tey eru trý til fýra ára gomul. Spurningar sum vit øll koma at hugsa um restina av lívinum.
Í 1973 kom teknifilmurin, sum enn í dag er ein klassikari.
”Charlottes tryllespind” er ein løgin filmur, tí meginparturin av honum er ikki animeraður, t.d. er grísurin Wilbur spældur av 47 ymiskum smágrísum.
Tað mest syrgeliga við hesum filminum, sum verður vístur í Havnar Bio her á jólum, er at vit hava, enn einaferð, fingið eina av hesum ræðuligu donsku útgávunum, heldur enn at hoyra geniala Steve Buscemi, óføra John Cleese og kend fólk sum Robert Redford og Juliu Roberts, skulu vit hoyra Preben Christensen, Gordon Kennedy og aðrar einkisigandi danskar sjónleikarar.
Filmurin er tó heilt góður og er veruliga verdur at síggja. Hetta er hin besti jólafilmurin fyri børnini.

**5 stjørnur av 6**
**Charlotte’s Web**

**Leikandi:**

Fía Dakota Fanning (donsk rødd: Katrine Krogshede)
Charlotta
Stine Stengade
Wilbur Oliver Berg
Gravesen
Preben Kristensen
Krákan Einar
Gordon Kennedy
Krákan Bent
Peter Aude

Frumframførdur í Havnar Bio (donsk útgáva), frá 26. desember klokkan 15.30.